# Á LEIÐ SAMA SØLA




**Í Rúsdrekkasølu Landsins verður sagt, at sølan í ár higartil undan ólavsøku er á leið hin sama, sum undanfarin ár**

Dagfinn Olsen

Tað eru ikki tær stóru broytingarnar, ið eru at hóma í sølutølunum hjá Rúsdrekkasølu Landsins. Ofta verður hugsað um, hvørt broytingar eru til ásvísar árstíðir.

Tølini í ár geva ikki orsøk til stórvegis undran ella umhugsan, nú ólavsøkan nærkast. Tølini eru á leið sama støði, sum undanfarin ár nakað fyri ólavsøku.

Í Rúsdrekkasølu Landsins verður sagt, at tølini sum heild eru tey sumu, sum undanfarin ár, og at hetta hevur verið so tey síðstu árini.

Sostatt kann staðfestast, at av tølunum higartil í ár ber til at siga, at føroyingar drekka á leið tað sama av rúsdrekka í ár, sum árini frammanundan.

*dagfinn@sosialurin.fo*

| | Ár 2005 | Ár 2006 | Ár 2007 | Ár 2008 | Ár 2009 | Ár 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 5.560.103 | 5.635.780 | 6.249.939 | 6.970.681 | 6.602.441 | 6.307.973 |
| Februar | 6.545.182 | 6.875.823 | 7.343.744 | 8.320.681 | 8.208.948 | 7.813.939 |
| | 12.105.285 | 12.511.603 | 13.593.683 | 15.291.362 | 14.811.389 | 14.121.912 |
| Mars | 7.883.933 | 7.808.492 | 8.709.263 | 8.698.112 | 8.090.783 | 10.468.395 |
| | 19.989.218 | 20.320.095 | 22.302.946 | 23.989.474 | 22.902.172 | 24.590.307 |
| Apríl | 7.835.003 | 7.660.428 | 8.055.577 | 8.508.048 | 9.442.602 | 7.588.418 |
| | 27.824.221 | 27.980.523 | 30.358.523 | 32.497.522 | 32.344.774 | 32.178.725 |
| Mai | 7.616.698 | 8.188.521 | 9.729.296 | 10.162.489 | 10.085.360 | 10.002.326 |
| | 35.440.919 | 36.169.044 | 40.087.819 | 42.660.011 | 42.430.134 | 42.181.051 |
| Juni | 9.513.049 | 9.818.890 | 9.487.000 | 9.634.429 | 9.974.868 | 10.583.842 |
| | 44.953.968 | 45.987.934 | 49.574.819 | 52.294.440 | 52.405.002 | 52.764.893 |
| Juli | 11.503.208 | 11.884.452 | 13.383.478 | 13.396.791 | 15.310.407 | |
| | 56.457.176 | 57.872.386 | 62.958.297 | 65.691.231 | 67.715.409 | 52.764.893 |
| August | 7.104.691 | 7.548.057 | 9.427.510 | 8.510.879 | 8.211.268 | |
| | 63.561.867 | 65.420.443 | 72.385.807 | 74.202.110 | 75.926.677 | 52.764.893 |
| September | 7.493.261 | 8.062.504 | 7.922.338 | 8.087.962 | 7.662.106 | |
| | 71.055.128 | 73.482.947 | 80.308.145 | 82.290.072 | 83.588.783 | 52.764.893 |
| Oktober | 5.958.153 | 7.691.741 | 8.953.497 | 9.539.481 | 9.020.390 | |
| | 77.013.281 | 81.174.688 | 89.261.642 | 91.829.553 | 92.609.173 | 52.764.893 |
| November | 7.516.887 | 8.333.822 | 10.342.980 | 8.800.669 | 8.749.509 | |
| | 84.530.168 | 89.508.510 | 99.604.622 | 100.630.222 | 101.358.682 | 52.764.893 |
| Desember | 14.499.089 | 14.894.951 | 15.222.644 | 16.551.482 | 16.874.112 | |
| | **99.029.257** | **104.403.461** | **114.827.266** | **117.181.704** | **118.232.794** | **52.764.893** |

***Tøl í krónum*** *(Kelda: Rúsdrekkasøla Landsins)*

# Duné á Ólavsøku

**Kendi danski bólkurin Duné er høvuðsnavn á Ólavsøkukonsertini 2010. Tey spæla eitt tónleikabland, ið tey sjálvi kalla indielecktrock**

Dagfinn Olsen

Duné er danskur rockbólkur, ið er settur á stovn í 2001. Limirnir eru Mattias Kolstrup, sangur, Simon Troelsgaard, guitar, Cecilie Dyrberg, sang, synth., guitar, Ole Bjørn Nielsen, synth., sang, Piotrek Wasilewski, bass, Malte Aarup-Sørensen, trummur og Danny Jungslund, guitar.

Fyrsta singleútgávan, Bloodlines, fekk sera góða móttøku. Við P3 Gullveitsluna í 2066 var bólkurin innstillaður sum "Årets Talent", men vann tó ikki hendan heiður. Í 2007 var bólkurin eisini innstillaður til MTV Europe Music Awards, men tá vann Nephew.

Dúné vann 11. januar í 2008 størsta rútmiska tónleikaheiður í Danmark, P3 Gull, Gaffa Prísin og 3 av 3 møguligum standmyndum við Danish Music Awards.

Duné fær íblástur av punktónleiki úr sjeytiárunum, popptónleiki úr áttatiárunum og frá indirocktónleiki úr nítiárunum. Hesa blanding nevnir Duné indielecktrock.

Bólkurin hevur spælt á Roskilde Festivalinum, umfram øðrum stórum donskum festivalum og pallum. Duné hevur hitað upp fyri Muse í Keypmannahavn, Foo Fighters í Munchen og hevur verið á ferð í Europa og í Japan.

Fyrsta útgávan hjá bólkinum varð í 2007 og 2008 givið út í Danmark, Týsklandi, Eysturríki, Schweiz, Benelux, Finnlandi, Svøríki, Russlandi og í Japan. Sølutølini vístu seg at síggja væl út.

Í tvey ár hevur eitt myndatól fylgt bólkinum og eini 700 tímar av tilfari eru tiltaks. Har er alt frá hjartasorg til persónligar lívssøgur. Uffe Trust, ið eisini hevur staðið fyri sjónbandaløgum hjá bólkinum, tekur sær av filmstilfarinum.

*dagfinn@sosialurin.fo*



## Diskografi

- Let's Jump (Demo 2003)
- Rock, Synth 'N' Roll (EP 2004)
- Go Go Robot (EP 2005)
- Bloodlines (Single 2006)
- A Blast Beat (Single 2007)
- Dry Lips (Single 2007)
- 80 Years (Single 2008)
- Victim Of The City + Heat (Single 2009)
- Let Go Of Your Love (b-side: Everybody Fights The Lust) (Single 2009)
- Please Bring Me Back (b-side: Remember) (Single 2010)
- Leaving Metropolis (EP 2010)
- Heiress Of Valentina (Princess) (Single 2010)

## Studioútgávur

We Are In There You Are Out Here (2007)
Enter Metropolis (2009)